FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

## Kunngerð um rudding

Fuglafjarðar kommuna hevur sett sær fyri, at bilvrak, akfør, bingjur og lutir annars, sum uttan góðkenning frá kommununi rekast á almennum ella privatum økjum, skulu verða beind burtur og latin góðkendum móttakara.

Sambært § 1 í umhvørvislógini og § 1, stk. 4 í nátúrufriðingarlógini er ikki loyvt at lata órudd liggja og rekast á almennum ella privatum uttanduraøki, og í § 10 um burturkast stendur, at ikki er loyvt at lata ónýtilig akfør liggja og rekast í haga, fjøru, á sjógvi, fram við vegi ella aðrastaðni.

Í § 61 í ferðslulógini stendur, at løgreglan kann burturbeina ella selja skrásetingarskyldug akfør, sum standa á almennum vegi uttan nummarplátu.

Tey, sum eiga/hava frammanfyri nevndu akfør/lutir o.t. á almennum ella privatum øki, skulu beina hetta/hesar burtur skjótast gjørligt.

Verður hetta ikki gjørt innan 23. juni 2010, beinir kommunan tað burtur fyri eigarans rokning.

*Fuglafjørður, tann 03. juni 2010*

**Fuglafjarðar kommuna
og Sýslumaðurin**

FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ

## Frá Fuglafjarðar býráð

Feløg og einstaklingar, sum hava ætlanir um at nýta fimleikarhøll skúlans vetrarhálvuna 2010-2011 verða biðin um at senda mentamálanevndini skrivliga umsókn í seinasta lagi fríggjadagin 02. juli 2010.

*Fuglafjørður, tann 7. juni 2010*

**Fuglafjarðar býráð**
Mentamálanevndin

## Ársaðalfundur

Føroya Blindafelag hevur ársaðalfund leygardagin 28. juni 2010 kl. 10.00.

Fundurin verður hildin í húsi felagsins, Traðabrekka 1, Tórshavn.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

## Vel millum 12 skeið innan jarð- og havfrøði, lívfrøði og KT-verkfrøði

Bachelorútbúgvingarnar í jarð- og havfrøði, lívfrøði og KT-verkfrøði á Náttúruvísinda¬deildini geva eisini møguleika fyri at melda seg til sum stakgreinalesandi í hesum skeiðum:

**Frá 23. august til 8. oktober 2010:**
- Náttúrulandafrøði
- Almenn og ólívrunnin evnafrøði
- Margfeldi av plantum
- Fiskalívfrøði
- Innleiðing í teldufrøði
- Innleiðandi forritan við Java

**Frá 24. oktober til 10. desember 2010:**
- Almenn havfrøði
- Havlívfrøði
- Ryggleys dýr
- Støddfrøði 1
- Stødd- og hagfrøði fyri lívfrøðingar
- Forrit og forritan í vinnuni

Støddin á skeiðunum er 7.5 ECTS, og undirvíst verður tveir dagar um vikuna.

Nærri upplýsingar og umsóknarbløð fáast við at venda sær til Náttúruvísindadeildina og við at vitja heimasíðuna www.setur.fo. Umsóknarfreistin til stakgreinalestur og til tær tríggjar bachelorútbúgvingarnar er tann 14. juni 2010. Tey, ið fáa miðnámsprógv seinni enn tá, kunnu kortini søkja og senda miðnámsprógvið inn í seinasta lagi 1. juli 2010.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Náttúruvísindadeildin

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

## Frá Tórshavnar Bátafelag

Aðalfundurin verður mánadagin 14. juni, kl 20,00 í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. Schrøtersgøta 9.

Skrá sambært lógum felagsins.

Uppskot, sum ynskjast viðgjørd, skulu verða nevndini í hendi í seinasta lagið 8 dagar undan fundinum.

***Nevndin***

RUNAVÍKAR KOMMUNA

## Pedagogur/varaleiðari til Dagstovnin Litlu Mørk Oyndarfirði

Vit hava brúk fyri einum pedagogi/varaleiðara at byrja 16. aug 2010 ella eftir nærri avtalu .

Starvið er 30-40 t. um vikuna.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Dagstovnurin Lítla Mørk er normeraður til 18 børn í aldrinum 0 ár til og við 1. flokk. Í aug 2010 verða væntandi 12 børn í aldrinum 3 – 8 ár.

Hølisumstøður og spæliøkið eru avbera góð, í nýbygdum stovni, sum er samanbygdur við skúlan í bygdini. Í Oyndarfirði er sera vøkur náttúra við nógvum møguleikum. Har er stutt til haga, á og fjøru, sum børnunum dáma sera væl.

**Vit ynskja at umsøkjarin**
- er við til at menna tað pedagogiska arbeiði
- evnar at seta mørk og at arbeiða við broytingum
- hevur góð samstarvsevni
- dugir at orða seg munnliga og skrivliga
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- er nýhugsandi, ígongdsetandi og kreativur..
- dámar væl at vera úti í náttúruni

**Fleiri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Káru Løkin leiðara tlf. 214306

**Søk starvið**
Við at senda Runavíkar kommunu eina umsókn í seinasta lagi 24. juni 2010

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26 · Postrúm 139
FO-610 Saltangará

# KAPPRÍÐING

Kappríðing verður við Leynavatn leygardagin 19. juni kl. 15.00.

Tilmelding seinast mikukvøldið 16. juni kl. 19.00

**Ring: 211789 · 219098**



**FØROYA RÍÐINGARFELAG**